## Góðir brúktir bilar

**Opel Vectra Sport 2.2**
Árg: 02.03.07 5 hurðar
Km: 39.500 Litur: beige
**Kr. 225.000**

**Mazda 6 2.0**
Árg: 02.12.03 4 hurðar
Km: 96.000 Litur: beige
**Kr. 135.000**

**Citroen Jumper Hdi**
Árg: -
Km: 122.000 Litur: reyður
**Kr. 78.000**

**Citroen Berlingo 1.9d**
Árg: 19.06.00
Km: 151.000 Litur: vínreyður
**Kr. 39.000**

**Suzuki Grand Vitara 1.6**
Árg: 06.12.07 3 hurðar
Km: 54.000 Litur: hvítur
**Kr. 145.000**

**Nissan Patrol 2.8 DTi Van**
Árg: 06.03.98 3 hurðar
Km: 200.000 Litur: grønur
**Kr. 87.000**

**Movano Van LWB L2H2 2.5 DI**
Árg: 15.02.05
Km: 145.733 Litur: bláur
**Kr. 125.000**

**Nissan Patrol 3.0di Van**
Árg: 18.12.00
Km: 126.000 Litur: svartur
**Kr. 115.000**

**Saab 9-3 2.0t 150hk**
Árg: 24.04.02 5 hurðar
Km: 123.000 Litur: Midnight blue
**Kr. 78.000**

**Ford Mondeo Ghia V6**
Árg: - 4 hurðar
Km: 75.000 Litur: svartur
**Kr. 112.000**

**Nissan X-Trail 2.5 LE aut.**
Árg: 28.06.06 5 hurðar
Km: 58.000 Litur: gráur
**Kr. 257.000**

**Toyota Rav4 2.0 4x4**
Árg: 02.05.03 3 hurðar
Km: 78.000 Litur: gráur
**Kr. 88.000**

**Suzuki Grand Vitara 2.0**
Árg: 16.02.06 5 hurðar
Km: 40.000 Litur: gráur
**Kr. 138.000**

**Boxer Van 2.2 HDI 330L1H1**
Árg: 29.12.06
Km: 27.000 Litur: hvítur
**Kr. 180.000**

**Opel Vectra El II 2.2**
Árg: 09.07.07 4 hurðar
Km: 69.192 Litur: silver
**Kr. 190.000**

**Nissan Almera 1.8 Ace**
Árg: 08.07.03
Km: - Litur: gráur
**Kr. 80.000**

**Peugeot Expert 2.0 HDi Com.**
Árg: 11.08.00
Km: 110.000 Litur: hvítur
**Kr. 58.000**

**Opel Astra 1.6 Limited**
Árg: 19.12.03 5 hurðar
Km: 95.000 Litur: gráur
**Kr. 82.000**

**Mazda 626 stc. 2.0 td**
Árg: 21.09.00 5 hurðar
Km: 138.000 Litur: grønur
**Kr. 60.000**

**Peugeot 407 SR 1.8**
Árg: 14.07.04
Km: 60.000 Litur: gráur
**Kr. 127.000**

**Peugeot 307 XR 1.6**
Árg: 21.12.01 5 hurðar
Km: 125.000 Litur: svartur
**Kr. 65.000**

**Skoda Octavia 1.6 FSi Ambi.**
Árg: 16.11.07
Km: 42.000
**Kr. 173.000**

**Opel Zafira Comfort 2.0 DTi**
Árg: 25.06.04 5 hurðar
Km: 90.000 Litur: silvurgráur
**Kr. 147.000**

**Nissan Patrol 2.8 td SE**
Árg: 26.01.00 5 hurðar
Km: 154.000 Litur: bláur
**Kr. 95.000**

undir Krákugjógv 19 · Tórshavn · tel 34 54 00 · fax 34 54 01
Auto Service
www.autoservice.fo







# Kjak



**Fríðálvur Jensen**

## *Walking On Fire:* Trúskapur ímóti sær sjálvari

*– er tað, ein kann siga um staklagið, sum kom út við Onnu Nygaard um dagarnar.*

Eg skal ikki dylja fyri, at eg var ikki sørt spentur uppá, hvar hon fór at kenna seg best og fáa lagt sín tónlistarligu sjangru í sína egnu legu, og tað hevur hon sanniliga gjørt við lagnum: *Walking On Fire*.

Onkuntíð vilja vit siga, at hatta ella hatta er júst hennara, men, sum eg havi ført fram, er tað av størsta týdningi, at hon finnur seg sjálva í tí hon leggur seg eftir.

At tað so er fallið henni í lut, at hon hevur fingið so framúr tilboð frá so framúr fólki ger bara hennara tónlistarligu lívsleið meira spennandi og gevandi.

Havi sitið nakrar ferðir og lurtað eftir lagnum, sum passar perfekt til hennara rødd og tað fantastiska talentið, sum henni er givið.

Sum hon sjálv sigur, er hetta nakað heilt annað, enn vit eru von við, tí henda blandingin av poppi, jazzi og latínamerikanska íslettinum ger hetta til eina sera øðrvísi sjangru, sum ikki ofta er at hoyra – eg havi so ikki hoyrt so væleydnaða samanrenning fyrr.

Tá eg segði, at hon átti at finna sína sjangru, er tað nú heilt serligt, at hon ikki leggur seg eftir teirri einu, men fær alt at fara upp í eina hægri eind – við at hon fær lagt nógvar sjangrur í eina og somu, sum ger hetta til nakað heilt framúr.

Eg var varin at siga, tá hon var dømd úti úr X-Factor, at hetta kanska var tað besta fyri hana sjálva, men nú hevur hon so sjálv sagt tað alment, at tað var tað besta, sum kundi henda fyri hennara framhaldandi karrieru, tí hon fekk júst tað umtaluna, ið skuldi til.

Tað er sera umráðandi fyri tey, sum vilja viðmerkja og geva sítt íkast, gott ella ringt, at tað er í útgangstøðinum hjá tí skapandi, ein ger seg til talsmann, tí tað gevur yvirhøvur onga meining, at tað bara skal finnast ein ummælandi peikifingur – tað er tann sum leggur sítt íkast eftir seg, sum kann velja at lurta ella hyggja eftir – ella lata vera.

Ongin ivi um, at tað eru nøkur, sum ikki eru samd við mær í hesum sjónarmiðnum, men tað er so tað.

Í hesum føri havi eg so valt at fara inn við mínum stuðlandi íkasti, tí eg meini, at vit hava her eina fantastiska sangarinnu, sum, eg giti, fer at ríka føroyska tónleikin, og so fer hon sjálv at kenna seg væl í tí hon ger – tað er tað mest avgerandi!

Eri sera spentur upp á sjálva stakfløguna, sum kemur á marknaðin mánadagin.

Alt tað besta, Anna!



**Sólvit Simonsen**

## Miðøkið er jú friðað...

*Nú brast aftur.... Hvat skal annað væntast, tá ið man ongan góðan hevur. Nú var komið so væl ávegis við at fáa ta brúkiligu vallógina fyri útjaðaran, so bleiv tungan á vágskálini, løgtingsmaðurin í Sandoynni, fyri hóttafalli, og har lógu vit.*

Ein annar maður kemur á ting fyri hann, eg sigi ikki javnaðarmaður, tí øll vita vit, hvussu hann kom upp í Javnaðarflokkin. Og nú gjørdi hann tað næsta kvettið.

Eg trúði at í Javnaðarflokkinum í mínari tíð, æt eitt, javnaður og brøðralag. Her kemur maður inn fyri sjúkan mann og endavendir øllum, sum hann hevur stríðst fyri.

Kann man ikki kalla slíkt fyri brøðralag? Vónandi vakna fólk nú og síggja, hvussu væl miðøkið arbeiðir fyri útjaðaran.

Men onki er so ringt at tað ikki er gott fyri okkurt. Jenis av Rana kemur so við sínum uppskoti og kjølhálar tingmenn, og har hevur hann so fingið sítt burturúr.

Eg biði um umbering; men her verið eg noyddur at taka til, at Judas kyssti eisini Jesus.

Síðani kemur tað til eykafíggjarlóg. Mín floksfelagi, verður nakað kroystur og manglar nakrar milliónir. Onki ivamál, vit leggja eftir Sandoynni, tað eru vit vanir við, og so verður hettar onki undantak.

Vit fingu eina tátu fyri Sandoyartunnilin, og hon bleiv heldur ikki unt okkum. Nú verður roynt at bera í bøtuflaka; men hvussu í verðini skulu vit trúgva nøkrum sum helst frá politikkarum?

Er tað nakar, sum hevur mist við falnum monnum, so eru tað vit í Sandoynni, tað vóni eg at Jóannes Eidesgaard eisini dugir at síggja.

Tað er nógv fyri at verða so illa royndur at sínum egna flokki, sum eg havi valt alla mína tíð, og ein stóran part verið stillari hjá, skuldi roynast so illa fyri tann minna mannin, og tað má man rokna okkum í Sandoynni fyri at vera.

Nú er tað tíverri eisini spurningurin, um hvønn hava vit at velja?

N. B. Marknagil hevði havt nakrar krónur at tikið av, men miðøkið er jú friðað.